TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Tórshavnar kommuna**

er uppbygd við trimum fyrisitingum: trivnaðar-fyrisiting, tekniskari fyrisiting og miðfyrisiting.

Hjá Tórshavnar kommunu starvast umleið 1000 løntakarar, ið taka sær av ymisku kommunalu uppgávunum.

Kommunan fevnir um Tórshavn, Hoyvík, Argir, Velbastað, Kirkjubø, Hest, Koltur, Nólsoy, Kollafjørð, Kaldbak, Hvítanes, Norðradal og Syðradal.

Í kommununi búgva yvir 19.000 borgarar.

www.torshavn.fo

# Skrivstovunæmingur

Hevur skrivstovuyrkið tín áhuga! So er hetta nakað fyri teg.

Tórshavnar kommuna bjóðar tær eina fjølbroytta og áhugaverda skrivstovuútbúgving innan almenna fyrisiting, har tú fært møguleika fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Sum næmingur hjá kommununi, fært tú eitt sera gott innlit í kommunal viðurskifti, og tað at starvast í einari politiskt stýrdari fyrisiting. Handaligi parturin av útbúgvingini fer fram í miðfyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu, har tú luttekur í fjølbroyttum uppgávum m.a. á starvsfólkadeildini roknskapardeildini og í snarskivunui. Tú lærir at nýta allar hentleikar, sum hoyra til nútímans skrivstovu.

Lærutíðin er vanliga tvey ár, men tað veldst um hvørja útbúgving tú hevur.

Skúlagongdin er fýra tíðarskeið í Danmark á til samans 13 vikur, vanliga á Niels Brock í Keypmannahavn.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við HH-prógvi ella studentsprógvi hava fyrimun.

**Setanarviðurskifti**
Ynskiligt er at tú byrjar skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt (janus@torshavn.fo) ella Annu Eiriksdóttir Simonsen (annas@torshavn.fo), tlf. 30 20 10

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 25. august 2005 kl. 12:00. Viðmerk á umsóknina "skrivstovunæmingur".

# Sjónleikafelagið Dramaverkstaðið

## Drama- og sjónleikaraskeið.

Skrivlig tilmelding: Við fullum navni, føðingardegi/ári, adressu, tlf. nr. og teldupost adr.:
Teldupost: dramaverk@dramaverk.net

**Tilmelding við vanligum brævið skal sendast til:**
Dramaverkstaðið
v/ Hjørdis Johansen
Korkagøta 12
FO-100 Tórshavn

*Gevið gætur! Tey yngstu skulu vera fylt 9 ár innan 01.01.06.*

**Kostnaður**
Limagjald til Dramaverkstaðið er kr. 550,-. Gjaldast skal harumframt eisini til Kvøld-Ungdóms- og Listaskúla í Tórshavnar Kommunu. Hesi gjøldini hava einki við hvønn annan at gera.

**Fráboðan**
Áðrenn byrja verður, fært tú fráboðan við teldubrævi. Byrjað verður væntandi í viku 38 ella 39.

**Bíðilisti**
Sleppur tú inn, fært tú bjóða eitt pláss í einum ávísum bólki, ein ávísan dag, eina ásetta klokkutíð.

Um tú ikki sleppur inn, fært tú bjóða pláss á bíðilistanum.

**Frítíðarvirksemi**

| | | |
|---|---|---|
| 9 til 10 ár | Týsdag 15.00 - 17.00 | FRÆIÐ (nýggj og roynd) |
| 9 til 11 ár | Mikudag 15.30 - 17.30 | SPÍRIN (nýggj og roynd) |
| 11 til 12 ár | Hósdag 15.30 - 17.30 | KORNIÐ (nýggj og roynd) |

**Kvøld & Ungdómsskúlin**

| | | |
|---|---|---|
| 14 til 15 ár | Mánadag 15.30 - 17.10 | HJÁLPIRÓTIN (nýggj) |
| 13 til 15 ár | Mána- ella fríggjadag 17.15 - 19.45 | AKSIÐ (roynd) |
| 13 til 15 ár | Týsdag 17.30 - 20.05 | RABARBAN (roynd) |
| 16 til 25 ár | Mikukvøld Evt. 18.00 - 20.30 | RÓTIN (nýggj og roynd) |
| 25 til 70 + ár | Hóskvøld Evt. 19.00 - 22.05 | HVONNIN (nýggj og roynd) |

*Broytingar í tíðunum kunnu koma fyri.*

# Kirkjuráðsval fyri Kvívíkar sókn

Kirkjuráðsval verður týsdagin 8. november 2005.

Vallistin fyri Kvívíkar sókn liggur frammi hjá Ninnu Joensen, allar gerandisdagar frá 23. til 31. august kl. 17.00-18.00.

Er onkur av misgáum ikki á listanum skal hann ella hon siga frá innan 8. september 2005.

Kvívík, 5. august 2005
Vegna valstýri,

**Súsanna Joensen**

# Lærari til Skálavíkar skúla

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2005/2006.

1 starv uml. 9 t/v vegna avlopstímar.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 26. augusi 2005.

**Skálavíkar Skúlastýri**
v/ Elsa Mariu Hentze
FO-220 Skálavík

# BYGNINGUR Í KLAKSVÍK TIL SØLU



**Um hóskandið boð fæst er bygningurin Stangavegur 21 í Klaksvík til sølu**

**Bygningurin er í tveimum hæddum og hvør hæddin er 242 m²**

**tel 456718**

September måned er **gratis** på Vrå Højskole

www.vraahojskole.dk - tlf: 98 98 10 10
90 pladser. Først til mølle. Tilbuddet gælder for unge under 30.

# Søkt verður eftir

roynum bilførara til kranabil

Áhugaði kunnu ringja á tlf. 213650

**SP/F Gestur Hansen**

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

**Lær at skriva føroyskt á alnetinum!**

**Skeið í september.**
**Skriva til:**
**pallm@post.olivant.fo**

Sosialurin 341800